Kyndil-Neistin 27-24 (13-10):

# Teir grønu ganga fram

*Eftir at Neistin seinstu árini hevur havt yvirtakið í innanhýsis uppgerðunum, eydnaðist tað mikudagin Kyndli at vinna grannauppgerðina, og harvið toga seg einsamallar upp á bronsuplássið*



**Neistin fekk ikki steðgað niðurtúrinum í dystinum móti Kyndli, og nú eru teir grønu farnir einsamallir avstað í bronsudystinum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir eitt heldur misjavnt kappingarár er Kyndil nú um at koma upp á beint.

Stórar vónir vórðu settar til liðið undan kappingini. Nú skuldi kappingin av álvara takast upp við vestmenningar og strandingar, men fyrstu umførini kastaðu alt annað enn nøktandi úrtøku av sær. Steypasigurin í vár tykist tó hava verið júst rætti heilivágurin hjá linðum, sum í løtuni tykist koyra við fullari ferð. Eisini hóast liðið nú er skert nakað í vongspælinum, har Heini Bendtsen gjørdist skaddur, júst sum hann hevði fingið sítt veruliga gjøgnumbrot á liðnum.

### Høvdu yvirskotið

Mikudagin var grannauppgerðin móti Neistanum á matarlepanum. Kanska júst Neistin átti sín stóra lut í niðurtúrinum hjá Kyndli í grundspælinum, tá teir bláu púrasta óvæntað byrjaðu landskappingina við einum sigri á grannunum, og restina av grundspælinum var Neistin eisini partur av oddastríðnum.

Her hava teir tó slept takinum, og mikudagin sleptu teir eisini takið á bronsumerkjunum. Eftir eina bragdliga Neista-byrjan, har fýra mál á rað vórðu skotin, áðrenn Kyndil slapp upp í part, var tað nevnliga Kyndil, sum stóð fyri restini.

Seks mál á rað frá teirra síðu sendu teir aftur framum, og restina av dystinum hildu teir alla tíðina fast um leiðsluna. Kanska bleiv munurin ongan tíð so stórur, at spenningurin fór úr dystinum, men sum skilst, so var ongan tíð nakar ivi um, hvønn veg dysturin skuldi fara. Mest sum hvørja ferð Neistin hevði hug at ressast nakað, svaraði Kyndil aftur. Hóast nakað skerdir, so telir liðið framvegis profilar sum Jacob Jónsson, Høgna Klein, Finnur Hansson og Hans Áka Dal-Christiansen, og samanlagt var hetta meira, enn Neistin megnaði at byrgja uppfyri.

Og tá Kyndil so fram móti dystarenda skræddi seg veruliga leyst, var seinasti ivin farin úr dystinum. Neistin fekk seinastu minuttirnar minkað nakað um munin, men tiðin var ov knøpp, til at spenningur kundi koma íaftur, og tí vóru hesi málini meira av kosmetiskum týdningi.

### Favorittar til bronsuna

Sum sagt, so hevur Kyndil við sigrinum lagt seg einsamalt á bronsuplássið, sum undan kappingarárinum varð roknað sum eitt minimumskrav til væl mannaða hópin.

Og sum seinastu dystirnir hava gingið, so er einki at ivast í, at Kyndil nú eisini eru stórfavorittar at vinna hetta heiðursmerkið. Seinastu vikurnar hevur spælið verið av tí meira støðuga slagnum, og tó at grannarnir úr Hoyvík helst vilja royna at blanda seg, so hevur Kyndil sum einasta liðið í endaspælinum havt eitt sera gott tak á teimum.

Hjá Neistanum tykist hinvegin bert ganga ein veg í løtuni. Kanska er fremsta orsøkin eisini, at liðið stóð seg mest sum ov væl í grundspælinum, soleiðis at vónirnar undan endaspælinum vórðu settar dekan ov høgt.

Størsti veikleikin hjá liðnum hevur víst seg at vera, at hópurin er ov tunnur, tá talan er um spælarar, sum kunnu gera avgerandi munin í einum dysti. Eina mest hava hesir verið Áki Mørk og Morgan Knezevic, og tó at tað í løtum hevur glógvað í fleiri av hinum, so hevur hetta ikki verið nóg mikið, tá mest hevur staðið á.

Undan kappingini varð tó sagt, at árið fyrst og fremst skuldi nýtast til at byggja eitt nýtt lið upp, og í so máta er Neistin eisini komin rættiliga langt. Í løtuni er størsti tørvurin helst ein sterkur miðspælari afturat, og verður hesin fingin til vega, kann væl verða, at støðufestið hjá liðnum verður væl størri komandi kappingarár.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Neistin 27-24 (13-10)**

Málskjúttar:
Kyndil: Finnur Hansson 7(2), Jacob Jónsson 5, Høgni Klein 5, Janus Einar Sørensen 4, Hans Áki Dal-Christinansen 3, Ken Zachariasen 2, Leif Mikkelsen 1
Neistin: Morgan Knezevic 8, Áki Mørk 5, Helgi Justinussen 5(1), Ragnar Stakksund 3, Birgir Kass 2, Dann Thorleifsson 1
Brotskøst: Kyndil 2, Neistin 3
Útvísingar: Kyndil 5, Neistin 2
Dómarar úr Tjaldur:
Hartvig Joensen & Trygvi Mortensen



# Jón Rói á blettinum

**Føroyski landsliðsspælarin skoraði einsamalla Brøndby-málið, tá danska felagið mikudagin tapti 2-1 fyri bretska Brentford**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

So vita tey í Brøndby eisini av álvara, hvussu vandamikil leikari Jón Rói Jacobsen er.

Føroyski verjuleikarin skoraði nevnliga einasta málið hjá Brøndby, tá donsku meistararnir í venjingardyst máttu lúta 2-1 fyri Brentford. Málið kom eftir bandaspæl vi Karsten Johansen, sum gav Jón Róa møguleika at fara ígjøgnum ensku verjuna, og einsamallur við málverjanum sendi hann bóltin trygt í netið.

Jón Rói, sum annars byrjaði dystin á beinkinum, hevði seinni eisini møguleika at javna, men enski málverjin stórbjargaði, tá føryingurin royndi seg útifrá.

Dysturin móti Brentford var annars hin næst seinasti á venjingarlegguni hjá Brøndby. Seinasti dysturin verður móti Premier League felagnu, Charlton, og um hendan dystin sigur Michael Laudrup, at hann fer at byrja við teimum ellivu, sum fara at byrja inni í fyrsta superligadystinum móti Viborg. Roknað verður við, at miðverjan hjá Brøndby tá fer at verða mannað við Dan Anton Johansen og Per Nielsen, meðan Jón Rói í fyrstu atløgu má finna seg í leiklutinum sum eykamaður fyri hesar báðar.



# Árliga stórkappingin í rútmiskum fimleiki

**Stórkappingin í rútmiskum fimleiki verður hildin á Kambsdali um vikuskifitð, og verða ikki færri enn 28 lið, sum fara at taka lut í hesum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*



*Eftir stórkappingina í fjør tóku genturnar hjá Havnar Fimleikafelag lut í DM-kappingini, har tær endaðu fremstar*

Vikuskiftið 8. og 9. mars verður árliga stórkappingin í rútmiskum fimleiki hildin í Ítróttarhøllini á Kambsdali.

Leygardagin setur Sigurð S. Simonsen, borgarstóri í Fuglafirði, kappingina, sum hevur luttøku av hesum feløgum: Flog úr Fuglafirði, Støkk úr Runavík umframt Ljósinum og Havnar Fimleikafelag, sum bæði eru úr Havnini.

Kappingarnar hava ofta verið drúgvar, og tí hevur Fimleikasambandið valt, at kappingin í ár skal haldast í tveimum.

Leygardagin verður kappingin fyri gentur og kvinnur, har 14 lið við eini fríari seriu og eini amboðsseriu taka lut. Amboðini hjá gentunum eru gjarar og hjá kvinnum bóltar. Gestalið verða eisini við. Úr Klaksvík kom tvey lið, eitt aerobic lið úr Gøtu verður eisini við, umframt trý smágentu lið úr Havn, sum tóku lut í opnari kapping, sum Havnar Fimleikafelag skipaði fyri fyrr í ár.

Í ár verur tað vinnandi liðið hjá kvinnunum, sum sleppur at taka lut í donsku grand-prix kappingini. Hendan kappingin verður í mai, so hjá vinnarunum er bara at dríva á framyvir, soleiðis at tey eru so væl fyri sum til ber til hesa kapping. Ein kapping, har føroyingar annars hava nógv at verja, eftir at genturnar hjá Havnar Fimleikafelag ikki gjørdu mætari enn at vinna, tá tær vóru gestaluttakarar í fjør.

Stórkappingin í Føroyum verður annars hildin eftir somu reglum, sum donsku Grand-Prix kappingarnar.

### Seinni dagurin

Sunnudagin verður tað borgarstjórin í Gøtu, Halldóra Ranghamar, sum setir kappingina. Hesa ferð verða tað pinkur og smágentur, sum fara at kappast. Talan verður um í alt 14 lið, har smágenturnar fara at kappast í fríari seriu, meðan genturnar fara at nýta bóltar. Gentu- og kvinnuliðini hjá Flog og Støkk verða annars gestaliði í hesum kappingunum.

Av teimum seks dómarunum, sum verða til kappingina, hava fýra júst verið og dømt í Danmark, har teir fingu góð skoðsmál eftir Sælandsmeistaraheitið í rútmiskum fimleiki. Dømt verður eftir tøkniliga og listarliga førleikanum hjá fimleikarunum, eins og framførslan sum heild skal metast. Hartil eru reglurnar broyttar nakað í ár, soleiðis at tað er møguligt hjá liðunum at fáa bonus-stig fyri fríu seriuna.

Tey trý fremstu liðini í kappingini fáa heiðursmerki fyri hvørja seriu sær, og sjálvandi verða steyp eisini latið samlaðu vinnandi liðunum.

Báðar dagarnar byrja kappingarnar kl. 15.00, og er kostnaðurin fyri ávíkavist vaksin og børn 80 og 10 kr.

# Óli aftur í Hvidovre

**Føroyski landsliðsleikari skal tetta verjuna, so Hvidovre kann sleppa sær úr niðurflytingarvandanum**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Eftir fleiri miseydnaðar royndir at fáa sær nýggjan sáttmála ymsa staðni, hevur Óli Johannesen nú aftur gjørt sáttmála við Hvidovre*

Síðani føroyska landskappingin endaði, hevur Óli Johannesen havt í umbúna at leita sær nýtt felag, har tilveran sum yrkisleikari kann halda fram. Hetta eftir at hann í fjør summar gjørdi av at fara úr Hvidovre, har stórur partur av hópinum gavst, tá millión-irnar hjá Peter Schmeichel ikki bóru neyðuga úrslitið við sær, soleiðis at danski málverjin at enda slepti sínari luttøku í felagnum.

Men eins og so nógvir aðrir fótbóltsleikarar í løtuni gera tað, so mátti Óli ásanna, at tað ikki er serliga lætt at finna sær nýtt felag í løtuni. Eftir eina skotska royndarvenjing, sum kortini varð av ongum, og eina kinverska ditto, sum tó ikki gav nakað úrslit, var annars farið at síggja svart út hjá Óla, men nú hevur hann so kortini funnið sær eitt stað at spæla fótbólt.

Tá Schmeichel gavst í felagnum merkti hetta samstundis, at felagið als ikki hevði sama fíggjarliga rásarúm, sum teir áður hava havt, men nú felagið er í vanda fyri at missa sessin í deildini, hava góðar kreftir kring felagið tikið seg saman.

Ein bólkur av sponsorum og privatpersónum hava nevnliga stuðlað felagnum fíggjarliga, soleiðis at møguleiki er at styrkja nakað um hópin, og nú eru so teir báðir fyrstu leikararnir komnir til felagið. Umframt Óla Johannesen er talan um 24 ára gamla Bo Nielsen, sum áður hevur leikt í Skive og Birkerød.

# Todi við aftur



*Todi Jónsson var millum teir fyrstu ellivu, tá FCK leikti venjingardyt móti Trelleborg mikudagin*

Todi Jónsson var púrasta óvæntað millum teir fyrstu ellivu, tá FCK mikudagin leikti venjingardyst ímóti Trelleborg.

Sum tað hevur verið siður seinastu tíðina, so var Todi annars als ikki við í hópinum, sum skuldi spæla dystin, men tá Siusoso Zuma gjørdist sjúkur, mátti FCK-venjaran finna annan leikara ístaðin.

Úrslitið gjørdist heldur óvæntað, at Todi fekk pláss millum teir fyrstu ellivu í dystinum í dystinum, sum FCK annars tapti 2-1.

Hvørt hetta á nakran hátt merkir eitt bjartari fótbóltsvár fyri Toda, man tó vera rættiliga ivasamt, men hinvegin hevur Todi áður sagt, at hann bara roynir at halda seg kláran, soleiðis at hann er klárur, um boð skuldu verið eftir sær.

**-jm**